## Mindeord om
# Tove Mommer

Tove Mommer, national leder af Aglow Danmark, er død i en alder af 76 år. Hun startede i november 1980 den tværkirkelige, kristne organisation, Aglow, i Danmark, som hun har været leder for lige siden. Det begyndte med, at Tove Mommer holdt Aglow-møder på Hotel Scandinavia i København, hvor man præsenterede det kristne budskab gennem vidnesbyrd og taler men også bød på selskabelig hygge og medmenneskelig omsorg. Siden er organisationen gennem Tove Mommers energiske ledelse vokset gennem årene, så der i dag er 23 grupper i Danmark og 7 grupper på Færøerne. Forinden havde Tove Mommer tilbragt en årrække i Australien efterfulgt af en stilling i SAS i København. Da hun forlod sin stilling i SAS, arbejdede hun utrætteligt på at starte nye Aglow grupper både i Danmark og på Færøerne. Tove Mommer ledte også de nationale Aglow konferencer gennem årene, hvor mange fik en livsforvandlende og trosstyrkende oplevelse i mødet med det kristne budskab.

Udover at være leder for Aglow Danmark var Tove Mommer også redaktør af Aglow-bladet, et magasin for kvinder. Tove var en visionær kvinde, som har set det som sin opgave at udbrede det kristne budskab til kirkefremmede, men hun havde også omsorg for og kærlighed til de mennesker, der krydsede hendes vej. Tove Mommer var som ven trofast i alle situationer. Hun var også en verdensdame, som elskede at rejse, og hun formidlede, at så mange som muligt i Danmark og på Færøerne kom med til de store, internationale Aglow konferencer i USA.

I januar 1996 fejrede Tove Mommer sin 70-års fødselsdag sammen med Aglows 15 års jubilæum, men på det tidspunkt havde Tove Mommer ingen planer om at blive pensioneret fra Aglow, så hun er død med "støvlerne på"! I det sidst udkomne nummer af Aglow-bladet, sluttede hun "Fra mit skrivebord" med disse ord: "Livets korthed – Dødens vished – Evighedens længde. Kære læsere, brug jeres tankeverden positivt. Lad os glæde os over den tid vi får givet."

***Indsendt af***
***Edith Theis-Nielsen, cand.polit.***

## Minningarorð um
# Juul á Dunganum
### í Sumba



Nú er Juul farin, og saknurin má vera stórur hjá Annu Gretu og Jarmundi og teimum, sum stóðu honum nær.

Altíð var hann hjálpsamur og blíður at tosa við; ongantíð eitt ringt orð frá hansara munni. Tað kenni eg til, tí vit vuksu upp saman og vóru grannar. Hann var mín besti vinur, men so fluttu vit til Havnar og sóust sjálvdan. Men hann var altíð í mínum huga, tí ein so góðan vin sum Juul, gloymir man ikki. Nógv kundi her verið sagt um Juul; hvussu góður hann var, men tað vita øll, sum búgva í Sumba.

Eg vil við hesum fáu orðum lýsa frið yvir besta vin mín, Juul. Hvíl í friði.

***Jóhannes Hansen,***
***Tórshavn***

# Gomul handverkslist í føroyska ogn

TÍÐINDASKRIV

Við stuðli úr Mentamálastýrinum er tað eydnast Føroya Fornminnissavni ognað sær eitt sjáldsamt savn við gomlum føroyskum knívum. Flestu knívarnir eru savnaðir av donskum knívasavnara fyri fyrra veraldarbardaga. Hann keypti teir frá dønum, sum høvdu verið í Føroyum og fingið ella keypt sær teir sum minnisgávur, tá ið teir fóru heimaftur.

Seinni hevur annar knívasavnari keypt savn hansara og fullfíggjað tað.

Fyri 25 árum síðani seldi hann Føroya Fornminnissavni ein part av savni sínum, og nú hevur hann selt tí restina, tilsamans 31 gripir, fyri kr. 200.000. Hetta verður mett at vera bíligt í mun til, hvat savnið hevði kostað á uppboðssølu á altjóða marknaðinum. Knívarnir, sum teir flestu eru skreytknívar, umboða bæði fornt føroyskt knívasmíð og tað serliga fína listhandverkið, sum mentist í aðru helvt av 19. øld og fyrst í 20. øld. Í 18. øld gingu bæði maður og kvinna við knívi.

Kendastur av teimum føroysku knívunum er grindaknívurin. Hann var upprunaliga ein vanligur knívur, men við longri blaði, sum var hóskiligt í grindadrápi. Skefti og slíðrar vóru einføld og lítið pyntað, og knívurin varð borin um miðjuna í tólvtáttabandi. Minni kendir nú eru teir vanligu knívarnir, serliga konufólkaknívarnir. Í savninum eru eisini dømi um hesar.

Tað var eitt serligt kynstur at smíða eggjørn. Á summum knívum sæst, at smiðirnir settu einfalt búmerki undir bakkan á blaðnum. Sagt er, at tað var ein liður í smíðitilgongdini. Merkið skuldi tryggja, at herðingin av eggjarninum eydnaðist. Hátturin at merkja sigur eisini frá, hvør smiðurin var. Eitt nú bera 4 smáir prikkar, ið mynda rútara, boð um, at smiðirnir við Gjónna við Leynavatn hava smíðað. Tríggjar opnar klingrur á rað siga frá, at Dánjal Didriksen á Hvítanesi hevur smíðað, og tríggir smáir krossar, at Jákup Poulsen á Hvítanesi hevur smíðað. Hesir smiðir vóru allir ættaðir av Miðgerði í Kollafirði.

Viðhvørt hendir tað, at fólk við serligum listarligum evnum finna uppá okkurt, sum onnur taka eftir. Tílík evnir hevði Jacob Zacharias Andrasson (1819 – 1868) á Argjum. Hann fann uppá ein hátt at gera knívar, sum aðrir síðani tóku upp og sum gjørdi, at føroyskir grindaknívar gjørdust satt listhandverk. Tað nýggja í hansara knívum var, at skefti og slíðrar vórðu gjørdi av ediligum træsløgum sum mahogni og ibenholt, har mynstur úr kopari, messing, beini, perlumóðir og silvuri vóru innløgd, millum annað við myndevnum úr spælikortum, naturalistiskum formum og geometri. Sum frá leið vórðu myndevnini serliga tikin úr grindadrápinum, t.v.s. úr amboðunum til tað, og so hvalinum og bátinum.

Tað er tó serliga bróðursonur hansara, Peter Arge (1860 – 1920), sum er kendur fyri hetta slagið av handverkslist. Knívasmíð hansara fall saman við tí tjóðskaparligu vekingini í Føroyum. Saman við høgtíðsbúnanum gjørdust knívarnir, sum hann gjørdi, og mynstrini í teimum, ítøkiligar ímyndir um føroyskan samleika, serliga hvalurin og báturin.

Síðani hava eisini fleiri smiðir tikið táttin upp, m.a. Tummas Thomsen í Sandvík og Ludvig Blåsvær í Havn.

Føroya Fornminnissavn er sera fegið um, at tað er eydnast Landinum at ogna sær hesar mentanarsøguligu dýrgripir.

Knívarnir hava verið sýndir fram í framsýningarhølum Føroya Fornminnissavns í Brekkutúni síðani seinasta summar. Í løtuni er framsýningin tó afturlatin vegna umvælingar. Vit lata upp aftur um miðjan mai.






Óli Samró, Farec:

# Móttøkan hitaði hjartarøturnar

**- Tað gleðir meg ikki minst, at tey flestu í hesum førinum eru farin eftir bóltinum og ikki manninum, sigur Óli Samró**

*Vilmund Jacobsen*

Óli Samró, sum var stigtakari og fyriskipari av ráðstevnuni á Hotel Føroyum um kappingarføri og lønsemi í fiskivinnuni, er stak væl nøgdur við móttøkuna, sum kanningarúrslitini hjá honum hava fingið.

- Aftaná at hava arbeitt í einsemi við øllum hesum í trý ár, eri eg ógvuliga fegin um ta móttøku, sum hetta tilfar hevur fingið, bæði her heima og í Íslandi og Noregi.

Óli sigur, at bæði íslendingar og norðmenn eru fegnir um tað arbeiði, hann hevur gjørt og halda tað vera sunt, at fiskivinnan í hesum trimum londunum verður samanborin, soleiðis sum gjørt er. Teir eru eisini fegnir um tann vinkul, hann hevur lagt í hetta arbeiði.

- Hetta hevur líkasum vantað í tí heimliga kjakinum, sum verið hevur í londunum, sigur Óli.

Hann vísir á, at arbeiðið, sum gjørt er, snýr seg ikki um at fortelja, hvør er bestur, men hvat er gott við ymisku skipanunum, sum eru galdandi, og hvat ikki er gott við teimum.

- Tað fer ongantíð at bera til at siga, at handan ella handan skipanin er tann besta, tí fyritreytirnar kunnu vera so ymiskar.

### Stór framgongd

Óli sigur, at úrslitið, sum hann er mest glaður fyri í kanningini, er, at føroyska fiskivinnan hevur havt eina ótrúliga stóra vinnuliga framgongd seinastu árini.

- Tølini vísa greitt, at tað er ikki bara tann góði fiskiskapurin og teir góðu fiskaprísirnir hjá okkum, sum eru orsøkin til framgongdina, tí hesi somu viðurskifti hava eisini verið galdandi í eitt nú Noregi, sum tó er í eini størri fiskivinnukreppu enn nakrantíð. Eg vil siga, at tær positivu fyritreytirnar peika sama veg hjá norðmonnum og íslendingum sum hjá okkum, sigur Óli.

Hann vísir á, at í Noregi taka myndugleikarnir óvanliga stórt atlit til búsetingina, og at tað skulu vera fiskimenninir, sum skulu eiga vinnutólini.


*Óli Samró*

### Eftir bóltinum

Óli Samró vónar, at kanningin, sum hann hevur gjørt og ráðstevnan á Hotel Føroyum, fara at elva til uppaftur meira seriøst kjak um fiskivinnuna.

- Tað gleðir meg ikki minst, at tey flestu í hesum førinum eru farin eftir bóltinum og ikki manninum, sigur Óli Samró.








